# Breiðband ger innrás í føroyska flotan

**TELETÆNASTA**

Tíðindaskriv

Alt fleiri føroysk fiskifør fáa breiðband- og IP-telefoni umborð. Hetta hevur bøtt munandi um trivnaðin, men aðrir nýtslumøguleikar fara so við og við at koma undan kavi, ljóðar tað frá bæði Føroya Tele og Vikmar, ið samstarva um at veita breiðband og IP-telefoni til føroyska flotan.

Tann stóra fjarstøða, ið plagdi at vera ímillum sjómannin og umheimin, er spakuliga við at hvørva. Hóast lívið á sjónum enn ber í sær, at tað ber til at njóta øll tey tilboð og allar teir hentleikar sum á landi, so minkar munurin alsamt.

Orsøkin er breiðband.

- Tað er við at henda ein lítil kollvelting, tá ið tað snýr seg um breiðband umborð. Tær royndir, ið vit hava fingið til vega, síðani vit byrjaðu fyri hálvum øðrum ári síðani, hava prógvað, at tøknin virkar væl. Góðskan á tí breiðbandi, ið verður veitt til skip, er fult so góð sum tann á landi, sigur Jan Egholm, stjóri á Vikmar.

## Fjarstøðan hvørvur

Søgan um breiðband umborð á føroyskum skipum er stutt. Fyrstu royndirnar byrjaðu í 2005 umborð á Chr. í Grótinum, og spyr ein manningina har umborð, stendur púra greitt, at breiðband er ein kærkomin hentleiki, ið verður dúgliga gagnnýttur til bæði privat og vinnulig endamál.

- Ikki kann sigast annað enn, at breiðband hevur broytt lívið umborð fullkomiliga. Á mangan hátt er fjarstøðan horvin. Vit kunnu senda teldupost, lesa tíðindi á heimasíðum, hyggja at føroyskum sjónvarpi á alnetinum og tosað í telefon á sama hátt, sum um vit vóru heima, sigur Jón Rasmussen, skipari á Chr. í Grótinum.

- Tøknin hevur fleiri fyrimunir, men fyrst og fremst er trivnaðurin millum manningina vorðin munandi betri. Vit kenna okkum tættari at landi enn áður, sigur Jón Rasmussen víðari.

Jón Rasmussen leggur afturat, at tað ikki bara er trivnaðurin, ið er batnaður. Tað er eisini vorðið lættari hjá eitt nú maskinmonnunum at leita eftir eykalutum og kanna prísir á alnótini áðrenn bílegging verður send.

## Føroya Tele og Vikmar veitarar

Føroya Tele og Vikmar veita breiðbandsloysnina, sum Chr. í Grótinum og fleiri onnur skip hava fingið umborð.

Dátur verða móttiknar og sendar umvegis eina parabolantennu umborð, ið hevur samband við fylgisvein. Dekningurin er góður í føroyskum sjógvi, men eisini við Ísland, í Barentshavinum og heilt suður í Norðsjógvin. Til ber at fáa breiðbandið at virka á øðrum havleiðum, men enn eru tó havleiðir úti í heimi, har ið lítil ella ongin dekningur er.

Tað er Vikmar, ið hevur ábyrgd av tólbúnaði og breiðbandsveitanini. Føroya Tele hevur ábyrgdina av telefonsambandinum, ið verður veitt sum alnet-telefoni - í fakmálið nevnt Voice over IP (VoIP), IP-telefoni ella bert breiðbandstelefoni.

- Áðrenn breiðband kom umborð, bar til at ringja umvegis fylgisvein. Men hetta er ein lutfalsliga dýr loysn. Við tí loysn, ið Føroya Tele veitir, fáa skip eitt vanligt føroyskt telefonnummar. Har er ongin munur á um ein ringir til grannan á landi ella til eitt skip á svartkjaftaveiðu. Sambandið er fult so gott, og kostnaðurin er tann sami, sigur Jan Egholm.

## Vaksandi áhugi

Hóast bert hálvtannað ár er síðani, at Chr. í Grótinum fekk breiðband og IP-telefoni umborð, gongur menningin skjótt á hesum øki. Tey skip, sum í dag fáa breiðband umborð, fáa enn fleiri møguleikar enn áður.

Og líkt er til, at alt fleiri reiðarar hava ásannað fyrimunirnar við at hava breiðband umborð:

- Áhugin fyri loysnini er stórur, serstakliga tá ið tað snýr seg um stór skip, ið eru leingi burtur. Men eisini minni skip, ið eru á sjónum einar 10 dagar í senn, duga at síggja møguleikar við at hava breiðband umborð, sigur Jan Egholm.

Bæði Vikmar og Føroya Tele vænta, at tess størri útbreiðslan av breiðbandi verður á sjónum, tess fleiri nýtslumøguleikar fara at koma undan kavi.

- Breiðbandið fer at hava við sær fleiri sløg av fjarstýring og fjarhjálp til skipini. Skip eru jú eitt lið í framleiðsluketuni, og við tí fokus sum framyvir verður á eitt nú sporføri, so verður tað neyðugt at hava gott internetsamband umborð, sigur Aksel Haraldsen frá Føroya Tele.

- Vit fara at uppliva ymiskar umsitingarligar skipanir og ymiska tøkni, ið tilsaman fara at økja um bæði produktivitet og góðsku, sigur Aksel Haraldsen víðari.

Jan Egholm frá Vikmar er samdur:

- Nú hava vit bygt motorvegin. Og har er ov mikið av plássi fyri nógvum bilum afturat, sigur hann.



*Ovast uppi í radaramastrini sæst stóra parabolantennan, sum móttekur dátu umvegis fylgisvein. (Myndina eigur Vikmar).*

**Skip fingið spennandi heimasíður**

Tað er ikki bara manningin, ið fær gagn av breiðbandi umborð. Eisini hjá familju og vinfólki á landi ber nú til at fylgja við, hvussu teir búleikast umborð. P/f Christian í Grótinum eigur eisini Norðborg, ið eisini hevur breiðband umborð. Bæði skipini hava egnar heimasíður, har ið til ber at síggja myndir og lesa um fiskiskap og annað áhugavert. Heimasíðan hjá Norðborg hevur adressuna *www.123hjemmeside.dk/ms-nordborg,* meðan tann hjá Chr. í Grótinum kann síggjast á *www.123hjemmeside.dk/chr*

Til ber at fáa meira at vita um breiðband og IP-telefoni til skip hjá antin Føroya Tele ella Vikmar.





Neyðstøður á sjónum krevja ein bjargingarbát, sum er álítandi og skjótur at sleppa í. Tíðin er avgerandi, og fullkomilig vissa má vera fyri, at báturin virkar. Fyrstu ferð.

Set títt álit á eitt gott merki og eina ábyrgdarfulla tænastu. Fønix umboðar viðurkendu bjargingarbátarnar RFD og DSB, ið fáast til bátar og størri skip. Og Fønix er góðkent at veita tænastu og eftirlit, ið livir upp til øll krøv.

Fønix

Tryggleiki til heimið, virkið og skipið

Fønix - á Hjalla, Hoyvík - Tel. 31 16 31 - www.fonix.fo